

*– Í hesum verki eru fimtan tekstir, sum tykjast at umboða eina veiftru av sera ymiskum vinklum, evnisøkjum, sjónarmiðum og viðgerðarsløgum. Her hitta vit menn og kvinnur, trúgvandi og tortrúgvin, ta subjektivu og ta sakligu viðgerðina, tað makrokosmiska løriftið og okkara lítla, atlantska mikro-univers, sigur Hanus Kamban. Her síggjast tríggir av høvundunum, Rúni Rasmussen, Sjúrður Skaale og Heini í Skorini*

mentan og okkara siðaarvi". Men leggur hann aftrat:

*Tað er avgerandi munur millum tey, ið hava eina religión sum* virðisgrundarlag, *og tey, ið hava fundamentalistiska tulking av eini religión sum* politiskt programm. *Tað fyrra samsvarar væl við fólkaræði og frælsi hins einstaka – tað seinna ger ikki.*

Betri og fyndugari kann hetta ikki sigast. Men Sjúrður heldur fram og greiðir uttan uttanumtos frá tí leikluti, fundamentalisman hevur í føroyskum politikki í dag. Hann ger hetta uttan illvilja, men, tað eg dugi at síggja, við virðing fyri sannleikanum og við at endurgeva brot úr stevnuskráum og greinum. Fyri lesaran er tað sera hent at sleppa at endurlesa og uppfríska tað, sum sagt og skrivað er tey seinastu árini.

Her er frásøgnin um trúboðaran, sum helt upp á, at Halgabók var Guds orð, men sum, tá sama orð sýntist at skurra í modernaðum oyrum, tók til tey ráð at sensurera Gud sjálvan! Er slíkt at virða halgubók og skriftina? Her er frásøgnin um ein annan gudsmann, sum spurdi seg sjálvan, um ódnin Katrina kanska var Guds revsing yvir tey samkyndu, men sum kortini var so frægur, at hann seinni tók síni orð í seg aftur.

## Speglmyndin

Í *Krossvegum* eru aðrir tekstir, sum eg ikki fái nomið við her, um journalistikk, um kvinnuligar prestar, um føroyskar fríkirkjur, um sambandið millum stat og kirkju, um fyrimunir við sekularisering, um kvinnuvanvirðing í okkara mentan, um kristindómin og teir føroysku politisku flokkarnar, um vísindir og trúgv, um tær brotsgerðir, sum verðsligir teokratar sum Stalin hava framt. Nógvir av hesum tekstum, har nakrir umboða eina positiva støðu til religiónina, aðrir eina atfinningarsama, eru væl skrivaðir og geva rúm fyri evnanna kompleksiteti, so her er ikki lítið av veiðu til tey forvitnu ella tey, sum skulu skriva stílar ella aðrar uppgávur.

Um eg nú vendi aftur til tað makrokosmiska løriftið, sum Heini í Skorini helt upp fyri lesaranum, so fari eg at loyva mær til seinast at gera eina niðurstøðu, sum eg ikki havi sæð í bókini, og sum sostatt verður mítt uppískoyti. Tankin um yvirgang sum eitt burturav islamistiskt fyribrigdi er eftir mínum tykki ikki eftirfarandi. Víst hava hugmyndafrøðingar sum Saiyid Qutb, Ayman al-Zawahiri og aðrir aftrat borið brenni á bálið.

Men vesturheimurin hevur eisini stoytt bensin á sama bál, fjálgað um gamla Saud kong og hansara fundamentalistisku wahhabismu, stuðlað mujahedin í Afghanistan, skapt hatur – har einki var frammanundan – millum hinduar og muslimar í tí gamla India og við síni kristnu óhógv har verið við til at skapa mentaða og tolsama muhammedstrúgv um til fundamentalismu. So kanska er modernaður yvirgangur eitt tvítak, eitt andsvar, speglmyndin av okkum sjálvum, rangan, har vesturlendsk imperialisma og kristin hugmóð, við sínum blóðuga gamaltestamentliga arvi, eru rættan. Kanska eru tað tveir eingudaátrúnar, sum í mongum eru líkir, sum hittast á Armageddon.

## Tann muslimska trúbótin

Men á sín hátt gevur eisini hetta bílætið eina skeiva mynd av veruleikanum. Tí Islam er, tvørturímóti tí vit halda, ikki eintýðugt, og sostatt fara bæði Samuel Huntington og Muhammed-teknararnir, við teirra manikæisku avmyndan, skeivir. Í tí islamska heiminum hevur í øldir staðið eitt stríð millum skriftlærdar (*ulama)* og modernistar. Millum hesar seinastu kann ein nevna Sayyid Ahmed Khan (1817-98), Chiragh Ali (1844-95) og al-Afghani (1838-97). Modernistarnir virkaðu fyri at føra upplýsing, vísindir og tolsemi inn í teirra mentan, ja, nakrir teirra førdu fram, at bæði tankin um vælferð til tey minni mentu og tankin um rættindir til kvinnur eru at finna í Muhammeds fyrsta ríki í Medina. Eitt meginhugtak í hesi rørslu er *ijtihad*: at lógin skal vera sjálvstøðug og óheft og sostatt leys av Koranini.

Europeisk mentan hevur, fyrst og fremst í Norðurlondum, takkað veri trúbótini, humanismuni og teimum sosialu rørslunum, lagt sín barbariska arv aftur um bak. Henda tilgond í okkara kristnu siðmenning, sum vit kunnu rópa sekularisering og humanisering, hevur tikið 2.000 ár. Verkirnir hava verið harðir og ófatiliga blóðugir og fatað um krossferðir, heksabrenning, tríatiárakríggj, nazismu, stalinismu, jødatýning og tvey heimskríggj. Ýta vit av eftir hesum tunga og drúgva burði, so koma muslimar ikki at okkara marki fyrr enn í árinum 2.622. Og møguliga hevur Islam, borin í heim sum ein sigursreligión, innbygdar forðingar, sum verða ringar at basa.

Hvørji ráð eru so, meðan vit bíða eftir tí muslimsku humanismuni, til at taka? Um vit venda aftur til Niels Lyhne, so hevði hann, hetta góðtrúna umboðið fyri eina horvna radikalismu, eina grunna og óbúna mynd av menniskjanum. Seinni komu Freud, Jung og aðrir, sum skiltu tað, sum eisini Shakespeare fataði, at menniskjað er ein irrationel vera, við evnum til kærleika og mildleika, men eisini til oyðingarhugi og thanatostrá. Vaska vit talvuna reina, so eru tað hesi seinastu, sum fylla hana aftur.

Tí paradoksið er jú, at tann holdleysa rationalisman, tann kantska abstraktiónin, tann trúar- og tjóðskaparleysa tóma talvan, ikki fyri øllum, men fyri mongum, og ivaleyst serliga óbúnum og einfaldum sálum, nettupp er tað feitilendi, har religiónin etur seg spikafeita og mangan vísir seg í yvirspentum, avskeplaðum og ørligum hami.

## Óvissunnar vísdómur

Tað er tí eftir mínum tykki tápuligt, í anda Gellners, at vísa tjóðskapi frá sær, ella í anda Lenins, at vísa átrúna frá sær. Tjóðskapur og religión eru ein neyðugur, enntá virðismikil, førningur hjá mongum menniskjum, ikki sum kravsom dogmatikk, men sum ein eyðmjúk mentan, sum í sínum vísdómi letur onnur hava frið og heldur seg frá valdi og politikki.

Og mong vilja halda, at religiónin er vakrast og sannast, tá hon ikki dyrkar nakran gud, men letur seg upp fyri undran, opinleika, óvissu og iva. Hesin vísdómur er vakurt og fyndugt borin fram í sjónleikinum *Nathan hin Vísi* eftir týska rithøvundin Lessing (1729-81), har jødin, tann kristni og muslimurin, ítí teir semjast um (í søguni um ringin) at lata seg úr síni átrúnaðarskykkju, hittast, naknir og átrúnaleysir so at siga, í kærleikans vísdómi og spekt. Persiski yrkjarin og sufi-mystikarin Jalal al-Din Rumi (1207-73) tekur soleiðis til:

*Eg krøki meg hvørki í átrúna*
*ella trúgv,*
*eri hvørki eystur- ella*
*vesturlendskur,*
*muslimur ella vantrúgvin,*
*zoroastriari, kristin, jødi ella*
*heidningur.*
*Mítt heim er handan stað og*
*navn.*
*Eg fevni alt og eri partur av*
*øllum.*

*Krossvegir* er eitt stak áhugavert og virðismikið íkast, um aktuell og viðkvom evnir, til orðaskiftið í Føroyum. Eyðkent fyri allar tekstirnar er, at teir, hvassir sum hóvligir, objektivir sum persónligir, eru skrivaðir við einum lagaligum og mentaðum tóna. Málburðurin er sum heild góður, og bókin er somuleiðis væl frágingin, hvat rættlestri og stavseting viðvíkir.

Bókin umboðar sjónarmið, sum undirritaði kann taka undir við, men eisini, tíbetur, tankar og sjónarmið, sum eg, hóast eg virði tey, ikki kann taka undir við. Sostatt er hetta ein bók, sum talar til mong, ymisk fólk, við ymiskum, enntá mótsettum, sjónarmiðum um religión og politikk. Hon átti at verið kærkomin, sum tilfar hjá skúlum, miðnámsskúlum og lærdum háskúlum.

*Krossvegir. Essay-savn um átrúnað og politikk. Ritstjórn: Heini í Skorini og Páll Holm Johannesen. Forlagið Sprotin 2007. Kr. 260.*